## Banna deyðarevsing í Russlandi

Eitt tíðaravmarkað bann ímóti deyðarevsing í Russlandi fer úr gildi um ársskiftið, men í gjár staðfesti dómsvaldið, at hóast bannið fer úr gildi, verður deyðarevsing framvegis ikki loyvd at fremja í verki. Tað kunngjørdi formaðurin í tí ovasta lógardómstólinum, Valerí Zorkin. Hann legði afturat, at úrskurðurin hjá dómstólinum er endaligur og kann ikki kærast, tí at Russland hevur góðkent og staðfest altjóða sáttmála um at banna deyðarevsing. Tað tíðaravmarkaða bannið í Russlandi hevur verið í gildi síðani 1999.



## Karzai lovaði batar

Hamid Karzai, sum varð útnevndur vinnari á afghanska forsetavalinum herfyri, varð í gjár tikin í eið á einum stórum hátíðarhaldi á forsetaborgini í Kabul. Altjóða samfelagið hevur kravt, at tann afturvaldi forsetin og stjórnin skulu fara í hernað ímóti teirri sera umfatandi korrupsjónini, og í setanarrøðuni lovaði forsetin bót og bata. Samstundis segði hann seg vera til reiðar at bjóða avbjóðaranum á forsetavalinum, Abdullah Abdullah, sæti í nýggju stjórnini. Millum áhoyrararnar í forsetaborgini vóru uttanríkisráðharrarnir úr USA og Russlandi, Hillary Clinton og Sergej Lavrov.

# Greiðar reglur fyri kringvarpið

**Helena Dam á Neystabø hevur í morgun almannakunngjørt eitt uppskot til public service sáttmála millum Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya**

KRINGVARP
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nú skulu partarnir skriva undir upp á hvat tað er, sum yngst og kravt verður av kringvarpinum* *Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin verður aðalorðaskifti í Løgtinginum um eitt uppskot hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum, Helenu Dam á Neystabø, um ein public service sáttmála millum tað almenna – Mentamálaráðið – og Kringvarp Føroya.

Uppskotið er rættiliga umfatandi, og í stuttum kann sigast, at dentur verður lagdur á tríggjar høvuðsbólkar innan kringvarp: mentan, børn og ung og mennan av føroyska málinum.

Um endamálið við einum public service sáttmála verður í uppskotinum sagt:

»Endamálið við public service-sáttmálanum er at lýsa, hvørjar uppgávur Kringvarp Førya skal loysa og at lýsa teir karmar, sum hetta public service-virksemið skal útinnast í«.

Eitt nú skal kringvarpið í størstan mun tryggja, at tilfarið:

- er óheft av seráhugamálum
- er fjølbroytt og argfalt
- er viðkomandi, álítandi og sakligt, tá talan er um tíðindi og upplýsingar annars
- veitir brúkaranum atgongd til týðandi upplýsingar og orðaskifti um avgerandi samfelagsviðurskifti
- vendir sær til nógvar avmarkaðar áhugabólkar eins væl og til ein størri skara
- gevur brúkaranum gott inn lit
- er dygdargott

### Uttanhýsis

Eitt av málunum, sum nomið verður við, er keyp av tænastum uttanhýsis. Sagt verður í uppskotinum um hetta :

» Kringvarp Føroya eigur at nýta ein lutfalsliga vaksandi part av fíggjarætlanini at keypa tænastur uttanhýsis, soleiðis at marknaðurin verður gagnnýttur á bestan hátt. Fríyrkisfólk hava tá møguleika at bjóða seg fram og menna seg á sínum økjum«.

Hetta er eisini fyri at gera sendiflatuna hjá kringvarpinum breiðari og fáa nýggjan íblástur.

Helena Dam á Neystabø vil tó ikki siga, um hetta merkir eina niðurlaðing av starvsfólkatalinum í kringvarpinum.

Eitt annað mál, ið nógv kjak hevur staðist av, er spurningurin um lýsingar í kringvarpinum, serliga útvarpinum. Í sínum fylgiskjølum mælir landsstýriskvinnan til, at lýsingarnar í sjónvarpinum í løtuni onga kapping hava, og hartil kunnu tær verða við til at økja um kreativitetin hjá teimum, ið fáast við slíkar filmslýsingar.

Tá tað til útvarpið kemur mælir Helena Dam á Neystabø til, at hesar við tíðini verða niðurlaðaðar, og at aðrar inntøkur so líðandi loysa hesar inntøkurnar av.

### Aðalorðaskifti

Public service hevur leingi verið umrøtt og leingi hevur verið ætlan um at orða ein sáttmála hesum viðvíkjandi. Nú er hesin so orðaður og verður lagdur fyri Løgtingið komandi mikudag til aðalorðaskifti.

Partar av sáttmálanum eru eyðvitað eym mál hjá ymsu politisku flokkunum, og tí kann roknast við onkrum broytingum í endaliga sáttmálanum. Men uttan mun til tað, so skal sáttmálin tryggja eitt betri kringvarp.

– Endamálið er at skapa greiðar karmar, men tað er eisini at gera eitt betri kringvarp, har dentur serliga verður lagdur á mentan, børn og ung og mennan av føroyska málinum, og eg rokni við, at tá hesin sáttmálin er undirskrivaður og komin í gildi, so hava vit eisini grundarlagið fyri einum betri kringvarpi, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum.

# Pelsar og jólastás í Reyða Krossi



*Gunnvør Joensen, leiðari fyri Reyða Kross handlinum, kann bjóða eitt nú ein pels umframt onnur klædnapløgg í hølunum á Bryggjubakka* *Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fram til jóla verður skipað fyri temavikum í Reyðakrosshandlinum á Bryggjubakka**

TEMAVIKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hesa vikuna er handilin á tremur við góðum, heitum klæðum til veturin. Úrvalið er fjølbroytt: pelsar, dýnufrakkar og ullintir frakkar – harafturat er ein rúgva av heitum, bundnum troyggjum bæði til børn og vaksin.

– Komandi vikurnar verður eitt stórt úrval av stásklæðum og prýði at finna í handlinum. Sera flottir veitslukjólar í øllum litum og sniðum og annars stásklæði til allar aldrar, sigur Gunnvør Joensen, leiðari í Reyðakross handlinum.

Handilin hevur fingið eina rúgvu av prýði, serliga hálsprýði, sum eisini verður at fáa komandi vikurnar.

– Reyða Kross handilin hevur bert góðar, heilar vørur, so tað ber væl til at ogna sær okkurt vakurt, spennandi ella annaleiðis til jólaborðhaldini í ár, sigur Gunnvør Joensen.

Í handlinum eru eisini jólavørur: pynt og brúkslutir, so jólagávan kann bjargast við at hyggja oman í handilin.

Handilin er opin hósdag og fríggjadag kl. 13.30 til 17.30 og leygardag kl. 11.00 til 14.00.

So tað er bara at koma oman og ogna sær okkurt serstakt, sigur Gunnvør Joensen.

Leygardagin 28. novemb-er verður loppumarknaður í húsinum hjá Reyða Krossi.

Øll, ið starvast í handlinum hjá Reyða Krossi, eru sjálvboðin, og tað er altíð brúk fyri fleiri fólkum.

– So um onkur hevur áhuga at gera ein mun í sambandi við hjálpararbeiði og hevur hug til at gera handil okkara enn betri, og samstundis verða við í góðaum samstarvi við onnur sjálvboðin, so kom oman og fá eitt prát ella ring til mín á tlf. 287119, sigur Gunnvør Joensen.